gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Gólvsølan

**151 bátar seldu góð 165 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum fríggjadagin. Niðanfyri framgongur, hvussu nøggv einstøku bátarnir seldu, eins og samlaða veiðan framgongur. Viðmerkjast skal, at sølan um telefonsuppboðssøluna ikki er íroknað**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | Sirið | Snella | 181 |
| FD 79 | Havørnin | Snella | 322 |
| FD 117 | Gerðisbáturin | Snella | 102 |
| FD 123 | Riddarin | Snella | 160 |
| FD 131 | Høghamar | Snella | 111 |
| FD 136 | Lilja | Snella | 267 |
| FD 205 | Greta | Snella | 1.106 |
| FD 235 | Streymsteinur | Snella | 141 |
| FD 237 | Eyð | Snella | 143 |
| FD 256 | Aðnasker | Snella | 139 |
| FD 28 | Irena | Snella | 126 |
| FD 310 | Sjóberin | Snella | 37 |
| FD 322 | Klettur | Snella | 405 |
| FD 348 | Skoratindur | Snella | 170 |
| FD 367 | Báran | Snella | 229 |
| FD 369 | Vørðan | Snella | 96 |
| FD 377 | Julia | Snella | 70 |
| FD 380 | Amanda | Snella | 358 |
| FD 398 | Havrenningur | Snella | 120 |
| FD 421 | Hjallur | Snella | 255 |
| FD 424 | Morning star | Snella | 65 |
| FD 428 | Margit j | Snella | 137 |
| FD 438 | Havborg | Botntrol | 319 |
| FD 460 | Safir | Snella | 378 |
| FD 718 | Lágin | Snella | 65 |
| FD 753 | Maria | Snella | 103 |
| FD 77 | Irdi | Snella | 232 |
| FD 771 | Katrin | Snella | 350 |
| FD 775 | Langanes | Snella | 178 |
| FD 780 | Bakkafossur | Snella | 125 |
| FD 821 | Hellisfossur | Snella | 243 |
| FD 855 | Lómur m/b | Snella | 1.579 |
| FD 89 | Høvdin | Snella | 249 |
| FD 900 | Høvnin | Lína | 1.250 |
| FD 956 | Anja | Snella | 117 |
| FD 981 | Másin | Snella | 76 |
| FD 984 | Tvey systkin | Snella | 286 |
| FD1054 | Aldubáran | Snella | 121 |
| FD1098 | Bylgjan | Snella | 215 |
| FD1116 | Frida | Snella | 180 |
| FD1142 | Durita | Snella | 119 |
| KG 106 | Barið | Snella | 1.481 |
| KG 123 | Háenni | Lína | 4.084 |
| KG 125 | Bjarnaberg | Snella | 318 |
| KG 127 | Skurðaklettur | Lína | 1.835 |
| KG 170 | Eljan | Snella | 275 |
| KG 189 | Vátiklettur | Lína | 1.180 |
| KG 21 | Kyrrasund | Snella | 186 |
| KG 235 | Flóðin m/b | Snella | 56 |
| KG 279 | Norðberg | Lína | 4.601 |
| KG 423 | Jaspissteinur | Lína | 179 |
| KG 452 | Beinissvørð | Snella | 262 |
| KG 522 | Svartaberg | Snella | 264 |
| KG 543 | Halgafelli | Lína | 478 |
| KG 548 | Elin h | Snella | 122 |
| KG 587 | Reynsmúli | Lína | 2.561 |
| KG 640 | Hansa | Snella | 40 |
| KG 661 | Rýpan | Snella | 273 |
| KG 666 | Sjóvarfossur | Snella | 121 |
| KG 705 | Sonja | Lína | 53 |
| KG 706 | Skýlisklettur | Snella | 149 |
| KG 74 | Nestangi | Lína | 477 |
| KG 743 | Elsa | Snella | 166 |
| KG 79 | Nevið reyða | Lína | 1.319 |
| KG 888 | Rannvá | Snella | 156 |
| KG 92 | Øldan | Snella | 176 |
| TG 10 | Evi | Snella | 204 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | Snella | 210 |
| TG 168 | Brekkubrøður | Snella | 77 |
| TG 26 | Majbritt | Snella | 170 |
| TG 284 | Hamraberg | Snella | 568 |
| TG 349 | Trý drangur | Snella | 576 |
| TG 40 | Kambur | Snella | 148 |
| TG 435 | Jórun | Snella | 239 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| TG 474 | Klettur | Snella | 166 |
| TG 487 | Topas | Snella | 155 |
| TG 514 | Keldafossur | Snella | 236 |
| TG 523 | Sóley | Snella | 331 |
| TG 56 | Marian m. | Snella | 282 |
| TG 576 | Svanur | Snella | 554 |
| TG 670 | Víkaberg | Snella | 795 |
| TG 744 | Marjun | Snella | 562 |
| TG 797 | Norðfarið | Snella | 297 |
| TG 853 | Borgin | Snella | 138 |
| TG 95 | Fløtunes | Snella | 216 |
| TN 117 | Havaldan | Snella | 264 |
| TN 149 | Ørvur | Snella | 133 |
| TN 164 | Borgarklettur | Snella | 2.280 |
| TN 270 | Torgun | Snella | 1.780 |
| TN 381 | Sancy | Snella | 290 |
| TN 390 | Trý systkin | Lína | 432 |
| TN 483 | Ægir | Lína | 3.241 |
| TN 561 | Safir 4 | Snella | 597 |
| TN 647 | Sílið | Snella | 340 |
| TN 712 | Teistaklettur | Snella | 782 |
| TN 718 | Hvítaberg | Snella | 785 |
| TN 723 | Brattaskorð | Lína | 695 |
| TN 753 | Tóra | Lína | 443 |
| TN 805 | Anna | Snella | 159 |
| TN 810 | Góðidrangur | Snella | 131 |
| TN 892 | Nøvan | Snella | 238 |
| TN 897 | Maj-n | Snella | 233 |
| TN 919 | Morgunroðin | Snella | 1.665 |
| TN 976 | Finnurin | Snella | 1.029 |
| TN1018 | Valkyrie | Snella | 38 |
| TN1099 | Lena | Snella | 250 |
| VA | Lómur | Snella | 653 |
| VA | Kelvin | Snella | 653 |
| VA | Anny | Snella | 653 |
| VA | Álkan | Snella | 653 |
| VA 105 | Barið | Snella | 198 |
| VA 109 | Ella | Snella | 409 |
| VA 125 | Líraberg | Snella | 430 |
| VA 132 | Lív | Snella | 239 |
| VA 135 | Havfrúgvin | Snella | 405 |
| VA 143 | Thurid | Snella | 662 |
| VA 145 | Bjarnafossur m/b | Snella | 50 |
| VA 188 | Helena | Snella | 100 |
| VA 192 | Havfrúgvin | Snella | 271 |
| VA 221 | Carina | Snella | 264 |
| VA 242 | Suðurfarið | Snella | 237 |
| VA 245 | Sunnvá | Snella | 157 |
| VA 251 | Elvira m/b | Snella | 308 |
| VA 269 | Anna maria m/b | Snella | 536 |
| VA 275 | Áardánjal | Snella | 127 |
| VA 283 | Skarvaklettur | Snella | 378 |
| VA 300 | Cemary m/b | Snella | 318 |
| VA 324 | Skarvur | Snella | 528 |
| VA 34 | Dunga hans m/b | Snella | 414 |
| VA 350 | Sirið | Snella | 464 |
| VA 50 | Tøðubóndin | Snella | 47 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| VA 60 | Dáva dánjal | Snella | 517 |
| VA 66 | Gunnvá | Snella | 202 |
| VA 717 | Stíganes | Snella | 233 |
| VA 81 | Gutta jógvan | Snella | 428 |
| VA 82 | Raðnes | Snella | 368 |
| VA 85 | Hemarin | Snella | 157 |
| VN 121 | Sjódrangur | Snella | 286 |
| VN 125 | Ægir | Snella | 126 |
| VN 132 | Tordis m/b | Snella | 226 |
| VN 138 | Ólavur | Snella | 344 |
| VN 267 | Jenny m/b | Snella | 249 |
| VN 286 | Skálabáturin | Snella | 142 |
| VN 378 | Turið | Snella | 145 |
| VN 405 | Krabbin | Snella | 377 |
| VN 425 | Halla | Snella | 215 |
| VN 46 | Vesturroðin | Snella | 143 |
| VN 491 | Fípan | Snella | 161 |
| VN 505 | Rógvi m/b | Snella | 142 |
| VN 513 | Klettur | Snella | 113 |
| VN 61 | Sjóarklettur | Snella | 84 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Brosma 0 | 91 |
| Brosma 2 | 77 |
| Brosma 3&4 | 173 |
| Hýsa 0 | 38 |
| Hýsa 1 | 1.948 |
| Hýsa 2 | 4.301 |
| Hýsa 3 | 2.810 |
| Hýsa 4 | 586 |
| Havtaska 0 | 38 |
| Hvítingur 0 | 1.733 |
| Kalvi 4 | 1 |
| Kalvi 5 | 2 |
| Kongafiskur 0 | 5 |
| Longa 0 | 50 |
| Longa 1 | 95 |
| Longa 2 | 47 |
| Longa 4&5 | 43 |
| Reyðsprøka 0 | 27 |
| Skrubba | 32 |
| Steinbítur | 161 |
| Toskarogn | 18 |
| Toskur 1 | 1.385 |
| Toskur 2 | 3.243 |
| Toskur 3 | 16.593 |
| Toskur 4 | 19.099 |
| Toskur 5 | 9.582 |
| Upsi 0 | 1.053 |
| Upsi 1 | 235 |
| Upsi 2 | 1.165 |
| Upsi 2&3 | 329 |
| Upsi 3 | 304 |
| Upsi 4 | 55 |



gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Hotel ynskir sær ein fittan buss í føðingardagsgávu

**Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn, sum í dag heldur 25 ára føðingardag, hevur ment seg alla tíðina, men tey halda, at tað framvegis ber til at gera umstøðurnar hjá teimum vitjandi uppaftur betri**

25 ÁRA FØÐINGARDAGUR
*Jóannes Hansen*

Tað er føroyskur føðingardagur í Keypmannahavn í dag. Hotel Tórshavn, sum nú eitur Sjúklingahotellið Tórshavn, komast heilt nógvir føroyingar við. Tey flestu, sum hava verið í Danmark, tí tey hava verið send á Ríkissjúkrahúsið ella okkurt annað sjúkrahús at fáa viðgerð, og tey, sum hava ferðast saman við onkrum av sínum kæru, ið hava verið sjúk, tey hava búð á føroyska hotellinum.

Hjá t. d. krabbameinssjúklingum hevur viðgerðartíðin ofta verið long. Tað hevur kenst møtimikið at fara í stórbýin, ikki minst tá sinniliga strongdin hevur verið stór orsaka av sjúkuni. Tí er tað ikki undarligt, at tey eru mong, sum kunnu skriva undir uppá, at tað hevur kenst sum ein føroyskur gróðrarblettur mitt í danska høvuðsstaðnum at hava havt møguleikan at búgva í einum føroyskum umhvørvi. Á Sjúklingahotellinum Tórshavn hevur tað alla tíðina verið lagdur størur dentur á tað, sum er føroyskt. Tá starvsfólk og búfólk eru føroysk, er tað náttúrligt at alt samskifti er á føroyskum. Maturin er føroyskur, føroysku bløðini eru tøk, og soleiðis kundu vit hildið á.

## Friðarligur føðingardagur

1. mai í 1976 lat Hotel Tórshavn, sum heitið var tá, upp í Gothersgade tætt við sjógvarnar. Sum í so mongum øðrum føri, tá tað hevur snúð seg um at betra umstøðurnar hjá teimum veiku og sjúku í samfelagnum, so var tað Karolina Petersen, sum sá tørvin, átti hugskotið og sum setti ætlanina í verk.

Tað byrjaði í smáum. Jonny Joensen var leiðari í mong ár, og so við og við menti arbeiðið seg. Men hølini kundu havt verið betri til endamálið, og at tað var tørvur á einum føroyskum sjúklingahotelli, har tað var meiri rúmsátt, sást m. a. á, at tað var meiri hjartarúmdin enn húsarúmdin, sum gjørdi av, at tað bar til at hýsa so mongum.

Fyri tveimum árum síðani tók landsstýrið avleiðingarnar av, at umstøðurnar ikki vóru tíðarhóskandi. Eitt nýtt leigumál varð gjørt, og síðani 22. januar í fjør hevur gistingarhúsið hildið til í rúmligum hølum á Eysturbrúgv – ikki so langt frá har Jagtvej og Østerbrogade krossast.

Stutt undan flytingini varð Ina Frisdahl, ið er sjúkrasystir, sett sum leiðari: Tey eru átjan starvsfólk – ikki øll eru í fulltíðarstarvi – og tá vit um vikuskiftið høvdu fyristøðukvinnuna í telefonini fyri at tosa um stóra føðingardagin, sum er í dag, fingu vit varhugan av, at Sjúklingahotellið Tórshavn framvegis er púra føroyskt:

– Leygardagin høvdu vit ræstan fisk og garnatálg til døgurða. Ein av sjúklingunum hevði døgurðan niður við til okkara. Hetta kemur meiri enn so fyri, og vit fegnast sjálvandi um heimliga íslettið. Vit gera føroyskar frikadellur og knettir burturúr donskum fiski, men við føroyskari tálg. Tað er væl umtókt.

Og verður talan um eitt føðingardagshald av tí føroyska slagnum?

– Stutt eftir at vit høvdu tikið nýggju hølini í nýtslu í fjør, høvdu vit móttøku, har 150 fólk vóru til staðar. Hesa ferð hava vit gjørt av, at dagurin skal haldast saman við teimum, ið eru her. Føðingardagin hava vit umleið 60 fólk búgvandi. Saman við teimum fara starvsfólkini at eta ein góðan døgurða við trimum rættum. Vit hava bjóðað Øssuri Berghamar úr Kristnastovu og konuni og Bergi Jacobsen úr Samuelskirkjuni og konuni at vera saman við okkum. Teir báðir skiftast um aðru hvørja viku at hava andakt á hotellinum.

– Í staðin fyri at brúka nógvar pengar til ein almennan føðingardag, so ætla vit at brúka pengar til at skriva søguna hjá hotellinum. Vit eru so smátt farin at savna tilfar, og vit miðja ímóti, at søgan skal verða liðugt skrivað 1. oktober í ár, sigur Ina Frisdahl.

Á hotellinum eru 70 seingjarpláss á 38 kømurum. Miðaltalið á gestum er umleið 60, og hægsta talið, sum hevur sovið har, er 98.

– Talið á vitjandi økist. Tað verða alt fleiri sjúklingar sendir úr Føroyum og til Danmarkar til viðgerðar, og talið á avvarðandi, sum ferðast saman við sjúklingunum, er økt, síðani kreppan hæsaði av aftur.



*Ina Frisdahl, leiðari á Hotel Tórshavn*

## Føðingardagsynskið

Men hóast hotellið ikki heldur stóran almennan føðingardag, so dylur Ina Frisdahl ikki, hvat hon droymir um, hevði verið sera kærkomið sum føðingardagsgáva hjá Hotel Tórshavn:

– Vit arbeiða alla tíðina við at betra góðskustøðið hjá teimum, sum búgva her. 1. apríl varð Elinora Olsen, sum hevur arbeitt á hotellinum í nógv ár, sett sum sjúklingavegleiðari. Tað vil siga, at nú hava føroyskir sjúklingar í Keypmannahavn – bæði teir, sum búgva hjá okkum, og teir sum búgva aðra staðni – ein hjásitara. Hon kennir umstøðurnar í Keypmannahavn, og hon veit um viðurskiftini á sjúkrahúsunum.

*Framhald á s. 14*



*Nýggja hotellið uttan*